## Klumman



**Jákup Mørk**
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

### Topphúgvur úr papmaché

Neyðars eysturríkarar. Eftir at teir í 17 ár hava roynt at vunnið á skommini, sum tað var at tapa fyri Føroyum í 1990, vórðu øll minnini grivin framaftur, nú lutakast var í Durban. Talan var um størstu vanlagnu, sum annars siðvandu fótbóltstjóðini hevur veri ðfyri. Og ivaleyst vilja øll í landinum bara gloyma, at Føroyar yvir høvur eru til. Okkara vegur til HM er tó júst at grava øll spøkilsini fram til alpulandið. Hickersberger sigur nú, at hann gleðir seg til Føroyavitjanina. Men um hetta er at fegnast um, hví ólukkan skuldi hann so nokta Jens Martini pláss í galla-showinum fyrr í ár.

Nei, her verður eingin blíðskapur. Teir skulu fáa aftur av somu skuffu. Veldugar papmache-topphúgvur skulu veittra um allan vøllin, hvørja ferð Eysturríkar IKKI fáa bóltin í mál. Og so skal Rógvi hava 7-tal á rygginum, heldur enn vanliga 6-talið. Retur-dysturin verður væntandi eingin trupulleiki. Hickersberger hevur enn einaferð fingið sekkin, og fótbólturin í landinum er mest sum í upploysn. Og tí hevur tað lítið uppá seg, so leingi okkara ikki gerast alt ov hástórir.

Frakland klára vit eisini – í øllum førum á pappírinum. Henry & co. eru nú so ræðsluslignir, at teir koma ikki aftur hendavegin við flogfari. Tað ber við sær, at Føroyar vinna á skrivaraborðinum, og Frakland missir sjálvani heimavøllin til seinna dystin, sum tá aftur skal spælast í Føroyum...

Soleiðis hava vit longu 12 stig, áðrenn kappingin er byrjað. So við einum sigri á Litava og bara eini hálvari sensatión á heimavølli móti Rumenia ella Serbia eru vit á øðrum plássi í okkara bólki. Tað gevur eftir øllum at døma rætt til play-off dyst, og her skulu vit bara trekkja Ongland. Tí eg ivist onga løtu í, at teir eru menn fyri enn eina ferð at klokka í tí, tá avgerandi dysturin er á skránni.

umborð

# Góðan morgun alt samdøgnið

**Flakatrolarin Enniberg fiskar í løtuni í russiskum sjógvi í Barentshavinum. Teir 34 menninir eru staddir eysturi móti russisku oynni Novaja Semlja, har myrkt er 24 tímar um døgnið. – Hetta riggar fínt. Vit siga góðan morgun við hvønn annan alt samdøgnið, sigur Sonny Johannesen, skipari, skemtandi**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo



*- Tað er stórt spell og kleyvarskapur frá føroyskari síðu, at vit mistu 700 tons av toski í russiskum sjógvi, nú samráðingar vóru millum Føroyar og Rusland, heldur Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hósmorgunin ringdu vit umborð á flakatrolaran Enniberg, sum loysti í Havn 17. november. Kósin varð sett eystur í Barentshavið, og nú vit høvdu skiparan Sonna Johannesen í telefonini, høvdu teir fiskað í eina viku.

- Vit eru staddir heilt eysturi á 47 stigum, eysturi ímóti russisku oynni Novaja Semlja. Leiðin verður rópt Gásabankin. Fiskiskapurin hevur verið heldur slakur teir fyrstu dagarnar, men í gjár og í dag hevur verið frægari. Vit fingu soleiðis 12 tons í flaki í gjár.

Sonny Johannesen, skipari, sigur, at 34 mans eru við Ennibergi hendan túrin, og teir eru allir fyrireikaðir upp á at vera burtur á jólum og nýggjárinum.

- Hetta er tað, sum vit, ið hava siglt við flakatrolarunum í nógv ár, eru vanir við. Síðan eg kom við hesum skipinum í 1994, havi eg tvær ferðir verið heima á jólum. So, vit eru ikki vanir við annað.

Hann sigur, at Enniberg hevur jólapakkarnar, sum sjómanskvinnuringarnir kring landið hava latið, við á hesum túri.

- Tað er einki, sum bendir á, at vit koma heim til jólar, men helst einar fjúrtan dagar inn í nýggja árið. Vanliga plaga vit at byrja vártúrin millum 20. og 25. januar, og tá verður farið í norskan sjógv at royna. Vártúrurin plagar at vera góður, tí tá er vanliga góð fiskitíð í norskum sjógvi.

Ein annar møguleiki er, sigur Sonny, at teir fara úr russiskum sjógvi um ársskiftið og í norskan sjógv at royna, men hetta veldst bæði um fiskiskapin í russiskum og norskum sjógvi.

- Roynist fiskiskapurin í russiskum sjógvi, tá ið stundar til ársskiftið, halda vit fram at fiska her. Vit eru onkuntíð farnir í norskan sjógv um ársskiftið, men hetta er ikki tað vanliga. Okkum dámar best at koma heim um hálvan januar og síðan fara nýggjan túr, tá ið januar mánaði fer at halla.

Skiparin sigur, at hendir tað, at teir fara úr russiskum í norskan sjógv at royna, verður hesin túrurin helst tríggjar mánaðar langur.

Á leiðini, har Enniberg roynir í løtuni, er eisini flakatrolarin Vesturvón.

- Vit eru so norðarliga og eystarliga, at her er myrkt næstan alt samdøgnið. Tað er ein lítil lýsing um 10-tíðina føroyska tíð, men hon varar stutt. Um einar 14 dagar ella so, verður myrkt allar 24 tímarnar í døgninum.

Spurdur, hvussu tað riggar, tá ið eingin lýsing er yvirhøvur, sigur Sonny Johannesen skemtandi:

- Tað riggar fínt, og vit siga góðan morgun við hvønn annan alt samdøgnið.

Samráðingar hava júst verið millum Føroyar og Rusland um sínámillum fiskiveiðirættindi fyri komandi ár. Úrslitið er í stuttum, at russiska svartkjaftakvotan í føroyskum sjógvi er skerd, eins og føroyska toskakvotan í russiskum sjógvi minkar við 700 tonsum í 2008.

- Hetta er stórt spell, og eg haldi eisini, at hetta er kleyvarskapur frá føroyskari síðu. Soleiðis, sum eg skilti støðuna, vildu russar lata okkum fiska somu toskakvotu komandi ár treytað av, at teir fingu somu svartkjaftakvotu í føroyskum sjógvi. Men hetta hava okkara embætisfólk og myndugleikar ivaleyst ikki verið nøgdir við.

Sonny Johannesen vísir á, at í ár eru 30 ár liðin, síðan fiskivinnusamstarvið byrjaði millum Føroyar og Rusland, og hann heldur tað vera stórt spell, at vit júst í hesum samráðingum skuldu lata kvoturnar, vit høvdu hjá hvørjum øðrum, minka.

- Úrslitið verður, at flakatrolararnir, sum bara hava Barentshavið at líta á, gerast verri og verri fyri, nú so illa verður avstað farið í samráðingunum, sum samráðingarnar hesaferð eru dømi um.

Manningarparturin við Ennibergi í fjør lá um einar 800.000 krónur.

Sonny væntar, at árið í ár verður heldur lakari, men kortini rættiliga gott, tá ið saman um kemur.

Ein hópur av fólki liggur fram við at sleppa umborð á flakatrolararnar, hvørja ferð teir koma heim at landa.

- Tá ið tað fræ ttist, at skipini sigla heim, ringir ein hópur av fólki og spyr um kjans, uppi fleiri hvønn dagin. Eg haldi, at einir 150 mans munnu hava ringt og spurt um kjans, nú Enniberg var heima hesaferð. Orsøkin er, at hesir kjansir enn teljast millum teir frægu í føroyskari fiskivinnu, sigur skiparin.

Enniberg er í sjónum einar 320-330 dagar um árið, og ymiskt er, hvussu leingi menn eru umborð í senn.

Vanligt er, at menn eru við einar tveir túrar og so heima ein túr. Í aðrar mátar eru summir umborð ein túr og í landi ein. Uppfatur aðrir kunnu vera tríggjar túrar við í senn og so heima í tveir.

- Hýran verður býtt millum menninar, sum eru umborð hvønn túrin, meðan teir, sum eru heima, ikki eru við í hýrupartinum, sigur Sonny Johannesen, skipari.

Á seinasta túri, sum endaði 3. november, var Dávur Jacobsen, skipari.

Hesin túrurin, sum var ein kombineraður flaka-og kongafiskatúrur, royndist hampiliga væl.